Klaksvíkar Kommuna I Sosiala umsiting



# Starvsfólk
## til nýggja dagstovnin

**Klaksvíkar Kommuna letur í august/september 2007 upp nýggjan dagstovn við Traðagøtu, og søkir í hesum sambandi eftir námsfrøðingum og hjálparfólkum.**

Á stovninum verða 64 børn. Stovnurin er bygdur í tveimum lonum, har ein vøggustova við 12 børnum og ein barnagarðsstova við 20 børnum verða í hvørjari lon.

***Søkt verður eftir:***
- Varaleiðara 40 tímar
- 3 námsfrøðingar á 35 tímar
- 4 námsfrøðingar á 30 tímar
- 4 námsfrøðingar á 25 tímar
- 4 hjálparfólk á 30 tímar
- 1 avloysara

***Vit vænta at tú:***
- ert nærverandi og fyrikomandi
- hugnar tær saman við barninum
- kanst geva barninum ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag
- dugir at síggja avbjóðingar fram um mørk
- dugir at síggja stóru møguleikarnar í at arbeiða á einum nýggjum stovni
- dugir at samskifta og ynskir at vera ein góður samstarvsfelagi
- hevur nakað at geva av og ynskir at vaksa námsfrøðiliga

***Vit bjóða tær:***
- spennandi starv, har tú hevur møguleika fyri at seta tín dám á stovn og gerandisdag
- ein stovn, har djór verða ein týðandi partur av námsfrøðiliga arbeiðinum.

***Setanarviðurskifti:***
- løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála við Kommunala Arbeiðsgevarafelag (KAF) og Føroya Pedagogfelag
- verður at tola broytingar í starvinum
- um námsfrøðingarstørvini ikki verða sett, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað størv.

Vilt tú vita meira um størvini, kanst tú seta teg í samband við Honnu Thøgersen samskipara ella Hedvig Johansdóttir leiðara, á telefon 410000 ella t-posti: hannat@klaksvik.fo ella hedvig@klaksvik.fo

***Umsókn***
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Klaksvíkar Kommunu í hendi **í seinasta lagi 28. juli 2007.**
Umsóknin kann sendast við t-post: hedvig@klaksvik.fo ella til:

**Klaksvíkar Kommuna**
**Postboks 2**
**700 Klaksvík.**

cre8 458006

Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I klaksvik.fo

Starvslýsing

Meginskrivstovan

## Fíggjarfulltrúi til Meginskrivstovuna

Eitt áhugavert starv sum fíggjarfulltrúi í Nærverkinum er leyst at søkja til setan skjótast tilber ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt nýtt, avbjóðandi og sjálvstøðugt starv í fakligum umhvørvi, har møguleiki er fyri at vera við til at ávirka menningina av fíggjarøkinum í Nærverkinum.

Nærverkið er skipað við Meginskrivstovu og 4 deildum. Virksemið umfatar alt landið. Umleið 1400 persónar starvast í Nærverkinum. Í løtuni rekur Nærverkið virksemi fyri uml. 460 mió. kr. árliga. Nærverkið er í støðugum vøkstri, og stórar uppgávur liggja fyri framman.

Nærverkið leggur dent á at hava eina miðvísa og javna tænastu, innan teir karmar, politiska skipanin ásetur. Fíggjarstýring og áhaldandi leiðslukunning, hevur í hesum sambandi ein avgerandi leiklut.

Vit hugsa okkum ein persón, ið hevur skil fyri tølum og dugir at samantvinna fíggjarliga tilfeingið við virksemið, ið fer fram í Nærverkinum. Hevur evni at skapa og framleiða vitan, ið kann nýtast sum grundarlag undir allari støðutakan og leiðslukunning. Hevur hegni til at skapa framtíðarloysnir og at seta hesar í verk, er sjálvstøðugur, hjálpsamur og hevur góð samstarvs- og samskiftisevnir.

**Vit leggja eisini dent á, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- hevur royndir innan fíggjarstýring
- hevur kunnleika til almenna fyrisiting
- hevur málsligt hegni og dugir væl at orða teg skrivliga
- ert álítandi og nærlagdur.

Starvið er skipað við tilvísing til stjóran í Nærverkinum.

Løn og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Nærverkið, tænastustaðurin í løtuni er Meginskrivstovan. Meiri fæst at vita við at venda sær til Mary J. í Garði, stjóra, á tlf. 304020

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Eirargarður 2, 2. hædd
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Mary J. í Garði, stjóri

Umsóknarfreistin er 23. juli

**Les meira á heimasíðuni www.naerverk.fo/ leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsu málaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo







